## Føroyskur dansur Sjómannadagin

Nú skipað verður fyri Føroya Sjómannadegi í Klaksvík í vikuskftinum, vil Klaksvíkar Dansifelag eisini verða við til at fjølga um skránna. Føroyskur dansur hevur ikki verið á skránni á sjómannadegnum áður. Formaðurin í Klaksvíkar Dansifelag, Heini Mohr, sigur, at felagið fer at skipa fyri føroyskum dansi á Stangarbrúnni leygarkvøldið klokkan 22, tá tiltøkini har fara at verða liðug. Ætlanin er at kvøða vísurnar, Ormin Langa og Vaagen. Tá liðugt er á bryggjuni, verður farið í felagshølini í Skálanum klokkan 23, har føroyski dansurin verður uppaftur tikin – og dansað verður, so leingi fólk hava orku og hug til tess. Klaksvíkar Dansifelag hevur 200 limir og dansað verður hvørt sunnukvøld í dansitíðini. Eisini skipar felagið fyri føroyskum dansi fyri børnum. Heini Mohr sigur, at áhugi er fyri føroyska dansinum í Klaksvík, og hann heldur, at hesin parturin av mentanini er væl "koyrandi" í Klaksvík í løtuni. Nú sjómannadagur verður, ynskir felagið at verða við til at fjølga um tey tiltøk, sum eru í Klaksvík hesar dagar. – Vit vóna, at áhugin fyri hesum tiltaki verður stórur, sigur Heini Mohr, sum hevur verið formaður í Klaksvíkar Dansifelag seinastu 11 árini. **(-vilmund)**

# Fiskivinnan undir luppin í

**Eftir framløgurnar í Skálanum, har kend og týðandi nøvn fara at umrøða ymiskar tættir í føroyskari fiskivinnu, verður pallborðsorðaskifti við áhugaverda og viðkomandi evninum í Norðoyggjum, "Viðurskiftini hjá útróðrar-og línuflotanum"**



RÁÐSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Aftur í ár verður skipað fyri stórari fiskivinnuráðstevnu, nú Føroya Sjómannadagur á triðja sinni verður hildin í landsins største fiskivinnubýi, Klaksvík.

Stevnan verður í Skálanum í Klaksvík, og lagt verður fyri fríggjadagin, 17. august klokkan 14.

Stigtakarar til ráðstevnuna eru Óli M. Lassen, Jákup Sólstein og Auðunn Konráðsson. Teir hava allir tríggir tilknýti til fiskivinnuna og kunnu sigast at umboða flestu tættir í vinnuni á sjónum.

### Tungvektarar

Hetta eru aðru ferð, at skipað verður fyri slíkari fiskivinnuráðstevnu í sambandi við, at Føroya Sjómannadagur verður hildin í Klaksvík.

Á ráðstevnuni í Skálanum verða fleiri kend nøvn innan føroysku fiskivinnuna. Vit kunnu siga, at her verða fleiri "tungvektarar", sum gjøgnum árini hava sett síni fingramerki á føroyska fiskivinnu.

Teir, ið fara at hava framløgu, eru Kjartan Hoydal, Meinhard Jacobsen, Bjørn Kalsø og grannskoðarafyritøkan Rasmussen & Weihe. Úr Íslandi kemur fiskifrøðingurin, Magnus Thor Hafsteinsson.



*Eini 180 fólk vóru við á fiskivinnuráðstevnuni í Klaksvík í fjør. Nú verður aftur lagt til brots, og fríggjadagin klokkan 14 verður lagt fyri í Skálanum*

Rasmussen og Weihe hava seinastu árini gjørt neyvar greiningar av fiskiflotanum og fiskavirkjunum, og á ráðstevnuni fer umboð fyri fyritøkuna at viðgera gongdina hjá ymisku skipabólkunum.

### Pallborð um húk

Umframt fyrilestrarnar í Skálanum, verður eisini skipað fyri pallborðsorðaskifti, og her verður evnið "Viðurskiftini hjá útróðrar- og línuflotanum".

Við pallborðið sita landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, Kjartan Hoydal, Auðunn Konráðsson, Jákup Sólstein, Anfinn Kallsberg og Meinhard Jacobsen.

At norðoyingar velja at viðgera húkaflotan við pallborðið, er ikki av tilvild. Klaksvíkin og Norðoyggjar annars hava meira enn nakað annað øki í landinum verið neyvt tengt at húkavinnuni upp ígjøgnum tíðirnar.

Og tó.

### Trolaravinna

Fleiri trolarar eru heimahoyrandi í Klaksvík í dag.

Umframt stóru flakatrolararnar hjá JFK, hava Kósin og Jóhan Páll Joensen keypt fleiri skip, bæði línuskip og ísfiskatrolarar. Hinvegin skerst ikki burtur, at tað er húkurin, sum hevur eyðkent Klaksvíkina fram um onnur økir í landinum.